# JESSICA EIGUR BESTU LÆGDINA

Nógvur heiður verður latin sjónleikarum og tónleikarum, og nú hevur Hollywood gjørt ein lista við teimum kendu kvinnunum, sum hava vakrastu bringuna. The Sun kallar tað Best Cleavage, og skal cleavage týðast til føroyskt sambært orðabókini, so er talan um »lægd millum bróstini«. Danir rópa hetta vist fyri kavalergang, men tað orðið verður ikki týtt í donsku-føroysku orðabókini.

Listin, sum nú verður endurgivin í ymiskum bløðum og tíðarritum, er gjørdur av kendum fólki og lesarum av ávísum tíðarritum í USA. Sambært hesum fólkum er tað 25 ára gamla Jessica Simpson, sum eigur bestu lægdina í Hollywood.

10 kendar kvinnur eru við á listanum, og í hølunum á Jessicu Simpson koma Selma Hayek, Carmen Electre, Angelina Jolie, Halle Berry, Jennifer Love Hewitt, Scarlet Johansson, Mariah Carey, Susan Sarandon og Nicolette Sheridan.



*Jessica Simpson eigur bestu lægdina í Hollywood, halda kend fólk og lesarar hjá ávísum tíarritum. Her sæst hon í filminum The Duke of Hazzard. Myndir. Scanpinx*



*Angeline Jolie er nummar 4 í røðini av teimum kendu kvinnunum*



*Jennifer Love Hewitt blandar seg eisini upp í og er nummar 5*

## William prinsur venur við Charlton



Í síðstu viku vitjaði bretski William prinsurin í fótbóltsfelagnum Charlton Athletic í London. Prinsurin luttók eina løtu í venjingini hjá besta liðnum hjá Charlton, og hann smæddist ikki burtur millum yrkisspælararnar. Eisini hitt William venjarar í felagnum, og hann stóð sjálvur á odda fyri einum parti av venjing við ungum spælarum í felagnum.

## Tvær Hilton til handils



Hilton-systrarnar Paris og Nicky plaga ikki at halda seg aftur frá at fara til handils. Tær hava ovmikið av pengum at brúka til júst tað, tær hava hug til, og nú um dagarnar vóru tær báðar til handils saman. Myndamenn vóru sjálvandi í hølunum á teimum, meðan tær hugdu seg um og keyptu hjá Jimmy Choo í Beverly Hills. Søgan sigur tó einki um, at tær keyptu meira enn vanligt, nú tær vóru saman til handils.

## Nei, tað er ikki Saddam



Hóast tað næstan kundi verið fyrrverandi irakiski forsetin, Saddam Hussein, sum sat á einum tíðindafundi í Mexico í síðstu viku, so var tað langt frá hann. Tað var hinvegin australski sjónleikarin Mel Gibson, sum hevur fingið stórt skegg í sambandi við upptøkurnar til nýggja filmin Apocalypto, sum er ein harðligur action-filmur, sum gongur fyri seg fyri 3000 árum síðani.

